# Paula og Petur føroyameistarar

*FM-kappingarnar í borðtennis eru nú lidnar á hesum sinni. Eldru deildirnar spældu í badmintonhøllini í Havn leygardagin. Úrslitini vóru hesi:*

**Unglingar:**
**einmansleikur:**
nr.1 Heini Johannessen, TÓR
nr.2 Ingi Højsted, TÓR
nr.3 Martin Olsen, TÒR

**Tvímansleikur:**
nr.1 Rógvi Hansen og Rókur Nielsen, TÓR
nr.2 Dann Thorleifsson og Heini Johannessen, TÓR
nr.3 Martin Poulsen og Rúni Nielsen, TÓR

**Blandaður tvímansleikur - (14-18 ár):**
nr.1 Tórbera Joensen, TBF og Dann Thorleifsson, TÓR
nr.2 Heidi M. Hansen, OyÍF og Eyðun Jacobsen, B68
nr.3 Maria Zachariasen, Streymur og Martin Poulsen, TÓR

**Meðaldeild:**
**einmansleikur:**
nr.1 Elias Mikkelsen, TÓR
nr.2 Høgni Carlsson, TÓR
nr.3 Ivan Niclasen, TÓR

**Tvímansleikur:**
nr.1 Elias Mikkelsen og Høgni Carlsson, TÓR
nr.2 Ivan Niclasen og Niels Símun Johannessen, TÓR
nr.3 Sverre Midjord, TBF og Wenzil Huusgaard, TÓR

**Kvinnur:**
**einmansleikur:**
nr.1 Paula Eikhólm, Streymur
nr.2 Elinborg Nygaard, TBF
nr.3 Súsanna Eikhólm, Streymur

**Tvímansleikur:**
nr.1 Súsanna og Paula Eikhólm, Streymur
nr.2 Elinborg Nygaard og Tórbera Joensen, TBF
nr.3 Heidi M.Hansen og Eleonora Kerá, OyÍF

**Meistaradeild - menn:**
**einmansleikur:**
nr.1 Peter Niclasen, TÓR
nr.2 Eyðun Luid, TÓR
nr.3 Birgir Carlsson, TÓR

**Tvímansleikur:**
nr.1 Bergur Jacobsen og Birgir Carlsson, TÓR
nr.2 Eyðun Luid og Peter Niclasen, TÓR
nr.3 Hans Hammer og Fríði Jensen, TBF

**Blandaður tvímansleikur fyri vaksin:**
nr.1 Elinborg Nygaard og Hans Hammer, TBF
nr.2 Sunrid M.Hansen,OyÍF og Bergur Jacobsen, TÓR
nr.3 Paula Eikhólm, Streymur og Birgir Carlsson, TÓR



*Paula Eikholm úr Streymi er føroyameistari í einmandsleiki og tvímansleiki hjá kvinnum*



*Petur Niclasen úr Tór er føroyameistari hjá monnum*

# Tórshavnar Súkklufelag spílar seg út

*Fyri fyrstu ferð í søgu felagsins, fer Tórshavnar Súkklufelag at skipa fyri súkkluvenjing fyri børnum og ungdómi.*

Fyri kortum hevði einasta súkklufelagið í landinum, Tórshavnar Súkklufelag, aðalfund, og sum eitt av málunum setti nýggja nevndin setti sær fyri, at fara undir venjing fyri børnum og ungdómi. Hetta er ikki roynt áður, og nevndin vónar at tiltakið fær góða undirtøku.

– Vit vita, at næstan hvørt mansbarn í Føroyum eigur súkklu, og tí er ikki neyðugt við nakrari størri investering. Men her verður kravið, at øll skulu súkkla við hjálmi, og eiga børnini ikki hjálm, ja so má hesin keypast, sigur Gunnar Dahl-Olsen úr Tórshavnar Súkklufelag.

Á skránni í hesum kappingarárinum verður sjálvandi eisini skipa fyri venjing fyri teimum vaksnu, og hesi verða býtt sundur í motionistar og elitu. Elitu er kanska so nógv sagt, men her verður hugsað um teir súkklarar, ið hava súkklað í fleiri ár, og sum hava roynt eitt sindur av hvørjum innan súkkling.

Motionistarnir eru tey, ið hava hug at súkkla, og kanska tey, ið hava gingið til Spinning í Yndi í vetur, og sum nú vilja út at royna seg uttandura eisini. Ætlanin er, at hesi ikki skulu súkkla alt ov langar teinar, og teinarnir fara tí at liggja eitt stað millum 10 og 30 kilometrar. Motionistarnir skulu venja mánakvøld klokkan sjey.

– Venjingin fyri børn og ung verður eisini mánakvøld, og ætlanin er, at venjingin bæði verður á vegunum, og á ymsum breytum runt í høvuðsstaðnum. Hetta tí, at fleiri helst koma til venjing við fjallasúkklum, sigur Gunnar.

TSF hevur sett ítróttarlæraran, Evald Rasmussen, at taka sær av hesari venjing. Ætlanin er eisini at skipa fyri kappingum fyri børnum og ungdómi, men hesar kappingar eru ikki endaliga fastlagdar enn.

Meðan tey vaksnu byrja venjingina í hesari vikuni, so byrja børnini ikki at venja fyrr enn fyrst í mai mánað.

Fyrsta kappingin hjá TSF verður leygardagin 6. mai. Tá verður kappast í Sprint Triathlon og tá verður svomið 750 metrar, súkklað 20 kilometrar og runnið 5 kilometrar.

**Venjingartíðir hjá TSF:**

**Barna/ungdómsvenjing:**
Mánadag kl. 19.00

**Motionistar**:
Mánadag kl. 19.00

**Elita**:
Týsdag kl. 19.00
Hósdag kl. 19.30